# Troling størri hóttan ímóti umhvørvinum enn oljudálking

**Kanningar, sum norska havrannsóknarstovan hevur gjørt av botninum í Barentshavinum, vísa, at botnurin er at kalla pløgdur av trolarum.**

UMHVØRVI
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*



*Myndir av botninum í Barentshavinum vísa, at botnurin er at kalla pløgdur av troli.*

Fleiri túsund sjófuglar hava eftir øllum at døma latið lív, eftir at olja rann úr farmaskipinum »Server«, sum sakk við Fedje í Vesturnoregi fyrr í mánaðinum. Altjóða viðurkendir havfrøðingar siga, at sum frá líður, fer oljudálkingin ikki at hava nakrar serligar avleiðingar fyri umhvørvið. Harafturímóti vísa teir á, at alt fleiri skip royna við troli, og at tað ger nógv størri skaða.

– Trolingin ger nógv størri skaða á vistfrøðina í havinum enn oljudálking. Skip brúka trol hvønn dag, men oljudálking hendir sjáldan, sigur professarin Michael J. Kaiser á lærda háskúlanum Wales-Bangor.

## Skerjir margfeldið

Tá trolið fer eftir havbotninum, tekur tað stórar nøgdir av plantum og botndjórum við sær og oyðileggur tey, og nógv av hesum eru als ikki brynjað til eina so harðliga viðferð. Harafturat sleingir trolið nógvan sand upp í sjógvin, og hann drepur ein hóp av ymsum smáverum. Hetta ávirkar og broytir bygnaðin og virksemið í vistfrøðini.

– Troling beinir fyri nógvum livandi á havbotninum, og tað broytir tað lívfrøðiliga margfeldið. Nógvar av teimum verunum, sum liva á botni, veksa ógvuliga seint, og tað kann taka mong ár, áðrenn tær koma fyri seg aftur. Men nógv av tí, sum trolið tekur við sær, kemur kanska ongantíð aftur, sigur bretski professarin.

John Gray, sum er professari í havfrøði við lærda háskúlan í Oslo, er samdur við sínum bretska starvsbróðuri:

– Tann óhepna avleiðingin av oljudálking er einki samanborið við ta oyðingina, sum stendst av fiskiskapi. Tann største hóttanin ímóti tí lívfrøðiliga margfeldinum í havinum er trolingin, sigur John Gray.

## Ávirkan allan vegin

John Gray sigur, at eginleikarnir hjá havbotninum at endurskapa føðsluevni, sum hava avgerandi týdning fyri plankton, verða nógv skerdir av trolingini, og at hetta eisini fær avleiðingar longri uppi í føðiketuni og soleiðis ávirkar alla vistfrøðina.

– Tað eru ikki nógvir fermetrar á havbotninum í Norskahavinum og Barentshavinum, sum ikki hava havt vitjan av einum troli, og tað er synd at siga, at viðferðin er lagalig. Trolið oyðileggur tilverugrundarlagið hjá verunum, sum halda til har, sigur John Gray.

Norski havrannsóknarstovnurin er í ferð við at kortleggja havbotnin í Barentshavinum sum lið í einari verkætlan, ið hevur heitið Mareano-verkætlanin, og kanningarnar hava prógvað, at havbotnurin á Tromsøflaket er at kalla pløgdur allur, sum hann er.

– Vit høvdu ikki væntað at síggja so mong og so týðilig spor. Nógvastaðni var eingin svampur at síggja, og tað kemst ivaleyst av, at hann er trolaður burtur, sigur lívfrøðingurin Lene Buhl Mortensen.

## Ósjónliga hóttanin

Hon heldur, at tað er neyðugt við fleiri kanningum, áðrenn tað ber til at siga við vissu, hvørjar avleiðingar hetta hevur fyri umhvørvið, men sjálv heldur hon, at tað hevði verið skilagott at lýst fleiri trolfríar øki.

– Tað er umráðandi at friða ávísar leiðir, sum kunnu varðveita tað lívfrøðiliga margfeldið, sigur Lene Buhl Mortensen.

Michael J. Kaiser, professari, sigur, at oljudálkingin við Fedje er ein vanlukka í sjálvum sær, men at hon bara fær ávirkan har um vegir.

– Í teirri stóru heildini hevur oljudálking lítla ávirkan á umhvørvið. Vit vilja sjálvandi sleppa undan óhappum av hesum slagnum, men tey eru ikki heimsins undirgangur, sigur bretski professarin.

Hann vísir á, at trupulleikin við oljudálking er, at hon er so sjónlig, og at tað hóvar ikki fólki at síggja deyðan fugl niðri í fjøruni.

– Trupulleikin við troling er, at tey flestu vita einki um tað, og at eingin sær tað. Men tær óhepnu avleiðingarnar fyri umhvørvið eu stórar, sigur John Gray.




Vika 5/2007

## MARKNAÐARRÁK

Hægri váði í Noregi enn hinum Norðurlondunum

Samsveiggið millum oljuprísin og norsk partabrøv er í løtuni 0,6, sum er væl hægri enn langtíðar miðaltalið á 0,3. Oljuprísurin flytir seg nógv í løtuni, og tískil er váðin á norska partabrævamarknaðinum hægri enn á hinum norrønu marknaðunum, ið eru tættari tengdir at altjóða búskaparrákinum. Meðan oljuprísurin er hækkaður seinastu árini, hevur forwardprísinum á olju verið oman fyri metingarnar hjá teimum flestu um framtíðar oljuprís. Nú er vent, og forwardprísurin er niðan fyri flestu metingarnar. Sostatt er mynstrið, har inntøkuuppmetingarnar hjá oljufyritøkum næstan eru komnar av sær sjálvum, nú vent til tað øvugta.

Vit mæla tí til at íleggjarar hava eyguni eftir norska partabrævamarknaðinum, og møguliga minka sum sín ognarlut til fyrimuns fyri hinar norrønu marknaðirnar.

### Gjaldoyru: Pundið hækkað nógv

Pundið hevur verið friðarligt síðan summarið 2005. Bretski tjóðbankin hækkaði tann 11/1 rentuna 0,25%-stig í 5,25%. Rentuhækkingin fekk pundið at hækka úr 11,11 upp í 11,38, sum er tað hægsta síðani várið 2003. Pundið er síðan ársbyrjan hækkað gott 2% og liggur nú á 11,28.

Norska krónan kann væntast at halda fram at hækka hesa vikuna. Tó verður torført at koma upp um 92 norsk oyru fyri donsku krónuna. Um hetta hendir, kann hon hækka enn meiri. Norska krónan er tengd at oljuprísinum. Oljuprísurin er seinastu 2 vikurnar hækkaður úr 50 í 55 dollarar fyri tunnuna, eftir at verða lækkaður úr 78 dollarum í august.

### Lánsbrævarentur hækka enn

10-ára lánsbrævarentan er nú 4,08%. Hon hækkaði 0,08% hesa farnu vikuna. Tað eru serliga gitingar um framtíðar rentupolitikkin báðu megin Atlantshavið, ið ávirka lánsbrævamarknaðin í løtuni.

### Hesa vikuna

Hesa vikuna halda roknskaparkunngerðirnar fram. Á okkara leiðum kunngera Danske Bank og Novo Nordisk roknskap, og í USA verða tað millum onnur Black & Decker og General Motors. Partabrævamarknaðirnir fylgja sera væl við gongdini í roknskapunum.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 575,36 | 0,0% | → |
| JPY | 4,73 | -0,1% | ↓ |
| GBP | 1.128,25 | -0,8% | ↓ |
| NOK | 91,27 | 2,6% | ↑ |
| SEK | 82,40 | 0,9% | ↑ |

**Virðisbrøv**

| Norrøn | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 98,15 | -0,1% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 130,97 | 1,6% | ↑ |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** | |
| Atlantic Petroleum | 550,50 | 0,5% | ↑ |
| KB Trygg Eurostoxx | 108,07 | 0,2% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*